# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ferðsluóhapp

**Tvey ferðsluóhapp vóru mikudagin. Eingin mannsskaði var, men tað var væl sloppið.**

LØGREGLAN
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*





*Tvey prutl rendu á bil á Sandavegnum*
*Mynd: Jan Müller*

Mikukvøldið klokkan góðar tjúgu minuttir yvir fýra, fekk løgreglustøðin fráboðan um ferðsluóhapp á Landavegnum. Ein 17 ára gomul genta og ein 15 ára gamal drongur koyrdu á hvør sínum prutli, tá bæði tvey rendu á ein parkeraðan bil. Fólkið, ið sá tilburðin, fráboðaði hann til løgregluna. Drongurin og gentan vórðu bæði send á skaðistovuna, men eingin stórvegis skaði var. Av tí at drongurin bert var 15 ára gamal, hevur hann ikki aldur at koyra prutl. Aldursmarkið er 16 ár. Drongurin fær allarhelst bót, sigur vakthavandi á løgreglustøðini. Prutlini eru tikin inn til kanningar fyri at vita, um prutlini eru tunaði, og tískil um ferðin hevði skyldina í óhappinum. Er hetta orsøkin fáa bæði bót fyri brot á ferðslulógini.

### Skilaleys yvirháling

Fyrrapartin mikudagin gjørdi eitt konufólk eina skilaleysa yvirháling sunnan fyri Hvalvík. Ein bussur koyrdi suðureftir, tá ein persónbilur yvirháladi. Annar persónbilur koyrdi norðureftir og noyddist at koyra út síðuna fyri ikki at renna á mótkoyrandi bilin og rendi út av vegnum. Bilurin fór sera illa, men eingin mannskaði var. Bilurin, ið yvirháladi, steðgaði ikki á men koyrdi víðari. Fólk í bilunum, ið vóru hjá, søgdu løgregluni frá, at yvirhálingin var undir øll lágmørk, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.



## Spildurnýggjur frítíðarskúli við Løgmannabreyt

Kom og ver við til at seta tín dám á at uppbyggja og skapa ein frítíðarskúla við nógvum spennandi og mennandi møguleikum, við rúmum til eitt nú drama, tónleik, teldu, máli-, træ-, og leirverkstað og drívhús.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert og spennandi starv, har tú frá byrjan verður við til at mynda títt dagliga arbeiði og skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum, har vinarlag, trivnaður, spæl, rørsla og ymiskt ítriv hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

Frítíðarskúlin hevur pláss fyri 96 børnum í aldrinum 6-9 ár. Frítíðarskúlin og skúlin fara at arbeiða tætt saman, har barnið er í miðdeplinum.

**Hetta vænta vit av tær**
Tú ert nýhugsandi og skapandi, hevur virðing fyri tí einstaka barninum, kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur og vilt verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí, sum vit seta okkum sum mál.

**Vit hava brúk fyri**
- Tveimum pedagogum, at arbeiða 30 tímar um vikuna.
- Tveimum hjálparfólkum at arbeiða 25-30 tímar um vikuna, harav einum ítróttarsinnaðum, tó ongin treyt.

Størvini verða sett frá 11. august 2008.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Ynskir tú at vita meira?**
So ring til stovnsleiðaran, Sandru Mikkelsen, telefon 21 43 64.

**Umsóknir**
Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um royndir og útbúgving skulu sendast til postrúm 3189, 110 Tórshavn ella til ftslog@torshavn.fo í seinasta lagi 2. aug 2008.

Tórshavnar kommuna